


# Musical-býurin London

Í London kanst tú uppliva fantastiskar sangleikir við framúr sangarum, tónleikarum og sjónleikarum. Vit hava her tikið nakrar av teimum best umtóktu sangleikunum burturúr rúgvuni.

## We Will Rock you




**DOMINON THEATRE**
Kanska populerasti sangleikurin í London seinnu árini. Byggir á tónleikin hjá rockbólkinum Queen, og 31 av størstu hittunum hjá brestska bólkinum verða framførd live. Sangleikurin er stuttligur, lívligur og ein stór tónleikalig uppliving!

## The Lion King

**LYCEUM THEATRE**
Teknifilmurin um løvukongin er heimskendur og ein av bestu Disney-framleiðslunum nakrantíð. Við tónleiki hjá Elton John og Tim Rice verður hetta eisini til ein framúr góðan sangleik. Hetta er ein tann flottasti sangleikurin, sum er settur upp, og heiðurslønirnar hava verið nógvar hesi seinastu 10 árini. Ein familjuuppliving!

## Thriller – Live




**LYRIC THEATRE**
Poppkongurin Michael Jackson var virkin í 40 ár, og hann seldi 750 milliónir plátur. Hittini eru næstan endaleys, og í hesum sangleikinum verður deyði poppsangarin heiðraður. Thriller bjóðar fantastiskan tónleik, nógvar effektir og framúr góðan dans.

## Mamma Mia!

**PRINCE OF WALES THEATRE**
Best umtókti sangleikurin í heiminum hevur verið at sæð í London síðani 1999. Sangleikurin byggir á tónleikin hjá ABBA, og søgan er eisini herlig. Biograffilmurin, sum byggir á leikin, hevur ikki gjørt áhugain fyri sangleikinum minni. Ein framúr góður og festligur sangleikur.




## Grease

**PICCADILLY THEATRE**
Disco, sleiktar frisúrur og frekur dansur. Grease spælir kvøld eftir kvøld fyri fullum húsum í London. Sangleikurin byggir á sera væl umtóktan film við frálíkum tónleiki. Sangir sum Summer Nights, You're The One That I Want og Greaded Ligthning gera hendan sangleikin til eitt ordans hitt.



## Phantom of the Opera

Ein klassikari innan sangleikir í London. Hevur verið at sæð í meira enn 20 ár og er framvegis sera væl umtóktur. Byggir á ein franskan ræðufilm um eitt legendariskt spøkilsi í einum gomlum leikhúsi, sum verður forelskað í eini songkvinnu. Flottar pallsetingar og stórsligin tónleikur.

## Chicago

**CAMBRIDGE THEATRE**
Ein stuttligur og frekur sangleikur um Roxie Hart, sum er ein kórgenta. Hon drepur elskaran hjá sær og sleppur undan fongsulsrevsing við hjálp frá advokatinum Billy Flynn. Umtalan í rættarmálinum ger hana kenda í show business. Sofistikeraður tónleikur og frískur dialogur.




## Jersey Boys



**PRINCE EDWARD THEATRE**
Sangleikurin um bólkin The Four Season. Ein av nýggjaru sangleikunum í London. Søgan snýr seg um tónleikararnar í Four Season, sum arbeiða seg av gøtuni í New York og upp á hæddirnar í tónleiki. Alt kryddað við sangum sum Sherry, Big Girls Don't Cry og Oh What A Night.